# Magnus Heinason – Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1608.
# Tíðarskeið: 16/03-23/03 - 2016

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, og longu.

**Aðrar uppgávur:** Nakað av toski, rogni og øðrum varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Lítla CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 16/3 kl. 20:05. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka hósmorgunin og tóku støðir til og við mánadagin. Allar 29 støðirnar vórðu tiknar; 20 støðir, har tað var grynri enn 200 metrar og 9 støðir djúpari. Ein støð (XVII 29) var føst tvær ferðir, áðrenn hon at enda varð tikin. Miniloggararnir vórðu ikki kalibreraðir. Veðrið var sera gott allan túrin. Vóru á Havnini á midnátt (mánakvøldið) og landaðu í Havn týsmorgunin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Talið av nytrum (umleið 400) var eftir ætlan fyri hýsu, men ikki fyri tosk, tí vit fingu so fáar toskar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 21. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. juni.

**Fyribilsúrslit:** Veiðan av toski var bara 30 toskar í mun til 49 í fjør, men hinvegin fingu vit umleið dupult so nógv av hýsu. Eisini var umleið dupult so nógv av nebbasild í trolinum í mun til í fjør. Magakanningarnar vístu, at nebbasild var á nærum øllum støðum grynri enn umleið 200 metrar og eisini var nógv til av smáari -eitt ára gamlari hýsu. Veiðan av longu, brosmu, gulllaksi og upsa er ikki sambærilig við í fjør, tá bert eitt hál var tikið á djúpum vatni. Fiskalistin er meira útgreinaður í ár í mun til onnur ár. Hitin við botn lá um 8 gradir Celcius.

**Talva 1.** Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1608 – yvirlitstroling á Føroyabanka í mars 2016.

| FISKASLAG | KG í 29 hálum | Nytrur | Magar | KG í 19 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HYSA | 2743.884 | 404 | 93 | 843.375 | 2.13 |
| HAVMUS | 2589.190 | | | 30.528 | 55.57 |
| GULLAKSUR | 1488.850 | | | | |
| SVARTKJAFTUR | 627.349 | | | | |
| TOSKUR | 381.800 | 30 | 30 | 669.330 | 0.37 |
| GLYSUFISKUR | 378.835 | | | 354.789 | 0.70 |
| SILVUR MURTUR | 347.327 | | | | |
| UPSI | 343.000 | 106 | 31 | 85.655 | 2.62 |
| LONGA | 308.600 | 37 | 5 | 788.551 | 0.26 |
| LOLIGO | 203.290 | | | 30.24 | 4.40 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 189.957 | | | | |
| LOPHELIA PERTUSA | 176.651 | | | | |
| S. VIVIPARUS | 150.272 | | | 40.658 | 2.42 |
| KNURRHANI | 137.420 | | | 46.246 | 1.95 |
| HAVTASKA | 120.830 | | | 19.040 | 4.16 |
| AGNHOEGGUSLOKKUR | 42.094 | | | | |
| BROSMA | 41.990 | 11 | 3 | 2.050 | 13.42 |
| GAMAL FISKUR | 36.940 | | | | |
| GEODIA SP | 35.811 | | | | |
| SKRAMBUL | 28.501 | | | 26.279 | 0.71 |
| STEINAR(<20CM) | 26.278 | | | | |
| STREYMSILD | 20.853 | | | | |
| REYDI KNURRHANI | 18.272 | | | | |
| SKOETA(BATIS) | 17.990 | | | | |
| SANDSPROEKA (LL) | 17.012 | | | 3.827 | 2.91 |
| S. MARINUS | 10.565 | | | 10.455 | 0.66 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 10.525 | | | | |
| TUNGA | 10.382 | | | 2.330 | 2.92 |
| NEBBASILD | 8.396 | | | 2.648 | 2.08 |
| LYSINGUR | 5.825 | 1 | | | |
| SANDSKOETA | 5.675 | | | | |
| GLASKVOYSA | 5.347 | | | 3.265 | 1.07 |
| CNIDARIA | 3.005 | | | | |
| ASTERIIDAE | 2.724 | | | | |
| HVITINGSBRODIR | 2.558 | | | 2.509 | 0.67 |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 2.360 | | | | |
| REYDKRABBI | 2.150 | | | | |
| LALLA | 1.942 | | | | |
| PORIFERA | 1.711 | | | | |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 1.711 | | | | |
| S. MENTELLA | 1.630 | | | | |
| PURPURIGULKER | 1.580 | | | | |
| BUKSVARTI HAVUR | 1.397 | | | | |
| ACTINIARIA | 1.274 | | | | |
| VØRPUSKEL | 0.535 | | | | |
| ROSSAMAKRELUR | 0.443 | | | | |
| HEKSAKRABBI | 0.410 | | | | |
| SOLASTERIIDAE | 0.363 | | | | |
| NEBBASKOETA | 0.284 | | | | |
| PAGURUS BERNHARDUS | 0.254 | | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| ØDA | 0.207 | | |
| PHAKELLIA SP | 0.165 | | |
| FLOYFISKUR | 0.126 | | |
| HUMMARI | 0.125 | | |
| GAGGA | 0.101 | | |
| JAKUPSSKEL | 0.085 | | |
| VØRPUSKEL(DEYD) | 0.082 | | |
| HVITINGUR | 0.081 | | |
| LITLI TUSSAFISKUR | 0.040 | | |
| SVIMJIKRABBI | 0.024 | | |
| BIVALVIA(DEYD) | 0.019 | | |
| BIVALVIA | 0.018 | | |
| GAGGA(DEYD) | 0.010 | | |
| TILSAMANS | 10557.125 | 589 | 162 |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum "Tur1608d.doc".

Petur Steingrund